# Windows 2000 stýriskipanin

*Niels J. Andreasen,*
*Netumsitari á VIT Sp/f*

Tann 17. februar í ár útkom nýggja røðin av stýriskipanum hjá Microsoft. Útgávurnar eru hesuferð 3 í tali og nevnast ávíkavist Windows 2000 Professional, Windows 2000 Server og Windows 2000 Advanced Server.

Fleiri Windows 2000 útgávur eru tó undir framleiðslu og útkoma seinni í árinum. Útgávurnar eru m.a. Windows 2000 Datacenter Server og Windows Millennium Edition, sum væntandi koma til summar.

Windows 2000 Professional, Windows 2000 Server og Windows 2000 Advanced Server eru nýggjar útgávur av ávíkavist Windows NT 4.0 Workstation, Windows NT 4.0 Server og Windows NT 4.0 Enterprise Edition. Windows Datacenter Server er ein nýggj stýriskipan ímeðan Windows Millennium Edition er eftirfylgjarin til Windows 98.
Nýggja stýriskipanin er nú vorðin øðrvísi at síggja til enn fyrru NT 4.0 útgávurnar, eins og stýringin av ymisku funktiónunum er broytt munandi. Stýringin er vorðin nógv lættari og minnur nú meir um Windows 98 við nógvum snildum funktiónum, so sum Plug and Play, streymveitsstýring umframt at nýggjur framkomin tólbúnaður nú kann brúkast.

Fólk hugsa flest, at nú er ein nýggjari útgáva av Windows 98 stýriskipanini komin, men so er ikki. Nýggju útgávurnar í Windows 2000 røðini byggja á Windows NT tøkni og skulu tí roknast sum nýggjari útgávur av Windows NT. Windows 95 og Windows 98 byggja framvegis á MS-DOS tøkni, sjálvt um hetta alsamt gerst minni sjónligt.

Seinni í ár kemur tó eftirfylgjarin til Windows 98 stýriskipanina, Windows Millennium Edition (navnið er tó ikki endaligt). Windows Millennium Edition byggir eins og Windows 98 á MS-DOS tøkni.
Microsoft hevur 2 høvuðs málbólkar við sínum Windows stýriskipanum -heimabrúkaran og professionella brúkaran. Til heimabrúkaran finnast útgávurnar Windows 95 og Windows 98. Til professionellar brúkarar finst Windows NT røðin.
Windows 2000 setur fylgjandi krøv til tólbúnaðin:

**Windows 2000 Professional**
- minst 64MB RAM og í mesta lagi 4GB RAM, størri enn 2GB harðdisk við 650MB av fríplássi er krav. Windows 2000 Professional kann brúkast á tólbúnaði við upp til 2 processorar.

**Windows 2000 Server og Windows 2000 Advanced Server**
- minst 128MB RAM, men mælt verður til 256MB RAM og í mesta lagi 4GB RAM, størri enn 2GB RAM, størri enn 2GB harðdisk við 1GB av fríplássi er krav. Windows 2000 Server kann brúkast á tólbúnaði upp til 4 processorar og Windows 2000 Advanced Server upp til 8 processorar.

**Windows 2000 Datacenter Server og Windows Millennium Edition**
- ikki upplýst enn.


SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 • Tlf.: 317620 • Fax: 317699 • www.tt.fo

Vit hava stórt úrval av:
Teldum • EDV-tilhoyri
Printarum • Telefax
Scannarum • Forritum
Telduspølum • Fartelefonum
Skrivstovumøblum

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177 • FO 110 Tórshavn
Tel. 31 88 13 • Fax 31 33 74
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo
Heimasíða: http://sth.olivant.fo

FØROYATELE
FAROESE TELECOM
Tinghúsvegur 3 • Postrúm 27 • 110 Tórshavn
Tel. 30 30 30 • Fax 30 30 31
T-postur: ft@ft.fo
Heimasíða: www.tele.fo

WWW.VIT.FO Tlf: 31 99 14
SKEIÐ - NETUMSITING - HEIMASÍÐUR
JournalVIT - GóðskuVIT - KommunuVIT - IntraVIT

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

MEGA
TÍN INTERNETHANDIL
N. Finsensgøta 21 • Postrúm 1152 • 110 Tórshavn
Tel. 32 05 05 • Fax 32 05 06
T-postur: mega@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mega.fo

ELEKTRON
...ein livandi leiklut í kunningarsamfelagnum

sam~teld


# Smátíðindi

## 60 GB harðdiskur fyri góðar 3000 krónur



Tað gongur skjótt við menningini í telduídnaðinum. Í seinastu viku boðaði Maxtor frá at teir komandi mánaðin koma á marknaðin við einum 60 GB harðdiski, sum í útsølu í Danmark kemur at kosta beint omanfyri kr. 3.000.

Fyri tey sum eru áhugaði í tøknuligu dátaum verður upplýst, at harðdiskurin melur 5400 rpm, og hevur eina atgongstíð uppá 20 ns. Harðdiskurin hevur innbygt 2 MB cache ram.

Av tí at Maxtor hevur valt 5400 rpm, kemur 60 GB harðdiskurin ikki at larma serliga nógv og væl minni enn harðdiskarnir sum nú eru á marknaðinum.

**Skrivað:**
**Steinbjørn í Dali**
**e-mail: sid@sosialurin.fo**

**GB = Gigabyte**
eitt Gigabyte er tað sama sum 1.073.741.824 tekn.

**Rpm**
merkir rotation pr minut ella snúningar í minutti.

**Ns**
Eitt nanosekund er ein milliardapartur av einum sekundi og er tann tíðin tað tekur at fáa atgongd at lesa data av harðdiskinum.

**Cache RAM**
er eitt slag av arbeiðsminni (RAM) har ofta lisin dáta av harðdiskinum liggja. Vit kunnu kalla tað eina millumgoymslu. Hetta slag av RAM er um 10 ferðir skjótari enn vanligt RAM, og sjálvandi nógv dýrari. Vanliga skilur man millum Level 1 cache, sum liggur millum gerilin (CPU) og vanliga arbeiðsminni og level 2 cache sum liggur millum gerilin og harðdiskin.


K@T@-hornið

Hava tygum lýsing innan KT-økið?

-Lýsið í KT-horninum

Ring 311820 ella maila til: lysing @sosialurin.fo

K@T@-hornið




# Sjálvuppgávan í bittum

***HEIMASÍÐU UMMÆLI:***

Tað tykist sum hugnaligu fundirnir, har øll familjan savnaðist við blýanti, lummaroknara, einum vegleiðandi faldara um skattaútrokningar og møguliga einum glasi av amerikanskum brandy, fyri at skrivað sjálvuppgávur, eru farnir í søguna. Í øllum førum um vit skulu gera sum Toll- og Skattstova Føroya leggur upp til.
Nú ber nevnliga til at senda inn sjálvuppgávu elektroniskt, og allar hentar upplýsningar eru tøkar á einum staði — á internetsíðuni hjá Toll og Skatt, ið er sera einfalt og nevnist www.tollskatt.fo.




**Alment**
Tað fyrsta sum ein leggur til merkis er, at hon er sett upp sum vanligt er, har bæði innanhýsis og uttanhýsis slóðir eru at finna. Tað er heilt greitt, at talan er um rúgvusmikið tilfar, og tað trýtur ikki við tilfarið av ymsum skattatekniskum slagi á síðuni.
Vit mugu eisini viðganga, at tað er lætt at surfa millum evnini á síðunum, við tað at framsíðan er sett upp sum eitt yvirlit, har dentur er lagdur á at hava hana so greiða sum gjørligt, heldur enn at oysa ymsar tøkniligar snildur inn á síðuna, við hundraðtals skrifttypum, ið bert eru til at ørkymla ein. Hetta er annars vanligt nú á døgum.
Síðan er harafturat uppbygd við sokallaðum *frames*, ið ger at brúkarar við eldri forritum enn til dømis Internet Explorer 3,0 ikki hava møguleika at lesa síðuna. Teimum munnu tað tó ikki vera nógvir eftir av.

**Originalitetur**
At síðan er sera greitt sett upp, ja so greitt at tað næstan er "totalt originalt", var ov gott at vera satt, so vit kagaðu eitt sindur á somu síðu hjá donsku Toll og Skattastovuni, og funnu sjálvsagt út av, at sami originalitetur var at finna har, men hetta skuldi ikki gjørt so nógv — vit eru við fyri at læra, ella hvat?

**Hentleikar**
Tað er sera umráðandi, at ein slík síða ikki bert er fyri skattaserfrøðingar, men eisini fyri vanliga brúkaran, ella skuldu vit sagt skattgjaldaran. Tað er okkara uppfatan, at Toll- og Skattstovan hevur valt ein gyltan millumveg, soleiðis at vit, bæði kunnu finna lógir og kunngerðir at leita í, men eisini meira lættlesiligt tilfar, ið ein og hvør kann líta at.

**Veruleikin**
Tað er ongin ivi um, at Toll- og Skatt er eitt sokallað kontrol organ, og tí ikki beinleiðis vil leggja seg út í ráðgevandi virksemi — hetta hava vit jú grannskoðarnar til. Hetta merkir eisini háttin upplýsningar vís, men hartil og ikki longur. Tú fært ikki beinleiðis ráðgeving, og hetta er sjálvsagt í fínasta lagið.

**Lay-out, og alt hitt...**
Vit halda at síðan er greitt uppsett, og meta at hon ikki kundi fallið nógv betur í eyga. Tøknuligu snildirnar eru lopnar um, men tað er eisini í lagi.

**Og so var tað sjálvuppgávan**
At sjálvuppgávan nú verður innlatin elektroniskt er bert enn ein hentleiki fyri okkum brúkarar, og nú eru vit eina umbering fátækari, tá vit skulu greiða frá hví vit (aftur í ár) gloymdu at gera sjálvuppgávuna til tíðina.
Talan er fyrst og fremst um rættingar til sjálvuppgávuna, ið eiga at vera gjørdir tá vit eru greið yvir at viðurskiftini mótvegis skattamyndugleikunum eru broytt.

**Niðurstøða**
Sum sagt, ein greið heimasíða, við nógvum upplýsningum, og tøkniligum fyrimunum. Ikki nakað roks, og tað er gott.

**Ummæli av www. olivant.fo:**

| | |
|---|---|
| Tøknikkur: | *** |
| Stílur/snið: | *** |
| Hentleikar: | ***** |
| Møguleikar: | ***** |
| Lætt at nýta: | **** |
| Skjótleiki: | **** |
| **Samanlagt**: | **** |

**Næstu ferð**
Vit lovaðu seinast, at vit skuldu ummæla síðuni hjá KT-Deplinum næstu ferð, so tað gera vit aftur hesuferð. Ummælt verður so aftur næsta hósdag.

**Soleiðis gert tú rættingar til sjálvuppgávuna.**

1. Far inn á **www.tollskat.fo**
2. Far út á vinstra bredda, "skrolla" niður vel: **Skráset sjálvuppgávuna**
3. Blaða til tú kemur í botnin á síðuni og vel: **Trýst her fyri at skráseta sjálvuppgávuna**
4. Síðani verður tú biðin um at skriva *P-tal* og *loynital*, upplýst verður, at loynitalið stendur á sjálvuppgávuni ella á skattauppgerðini, sum tygum hava fingið sendandi.

Vit ynskja góða eyðnu við rætta skatti tygara.

**Skrivað:**
**Finn Jensen**
**finn@sosialurin.fo**

# Prískanning

**Sjálvt um vit hava roknað við donskum prísum og hava íroknað fraktina til Føroyar, so eru uppí 23% at spara við at keypa á internetinum.**

Vit hava spurt nakrar føroyskar telduhandlar hvat listaprísurin (t.e. prísur uttan møguligan avsláttur) á Microsoft Office 2000 pakkanum er. Office pakkin verður seldur í fleiri útgávum. Vit hava spurt um prísir á standard- og Professionalpakkanum, bæði fulla útgávu og uppstiging (uppgradering) frá eldri útgávu. Com-Data, Farodane og Itec svaraðu okkara fyri-spurningi, meðan 3 aðrir handlar vit spurdu ikki svaraðu fyrispurninginum.
Prískanningin vísir at tað ikki er stórur munur á prísinum á standard vørum frá føroysku KT-veitarunum.
Bíligast er at handla hjá Com-Data í Klaksvík meðan tað er eitt sindur ymiskt hvør er dýrast. Prísmunurin er ikki stórur, tó við einum undantaki, úr kr. 50,00 uppí kr. 1.400,00.

Um vit samanbera við ein stóran alnethandil sum www.cdromland.dk, so eru rættuliga nógvir pengar at spara. Sjálvt um vit hava roknað við donskum prísum og hava íroknað fraktina til Føroyar, so eru uppí 23% at spara við at keypa á internetinum, í mun til bíligasta handil í Føroyum. Í krónum er talan um eina sparing kr. 765,00. Um málið ikki er nakar trupulleiki fyri føroyska brúkaran eru um 1.000 krónur at spara afturat, um hann velur eina enska útgávu. Hetta er tó bert galdandi fyri uppstiging og ikki fyri fullar útgávur.

**Skrivað:**
**Steinbjørn í Dali**
**sid@sosialurin.fo**

| | Standard | Std. uppstiging | Professional | Prof. upps. |
|---|---|---|---|---|
| Com-Data | 5.375,00 | 3.200,00 | 6.500,00 | 4.275,00 |
| Farodane | 5.575,00 | 3.250,00 | 6.750,00 | 4.375,00 |
| Formula.fo | Selja ikki | 3.400,00 | 7.900,00 | 4.200,00 |
| Itec | 5.625,00 | 3.625,00 | 6.875,00 | 4.375,00 |
| Teldutænastan | 5.590,00 | 3.490,00 | 6.690,00 | 4.490,00 |
| www. cdromland.dk | 4.860,00* | | 5.664,00* | 3.564,00* |

Yvirlit yvir prísleguna á Microsoft Office pakkanum. Handlarnir eru settur í bókstavarøð. Allir prísir eru í krónum og við MVG. *Íroknað frakt kr. 165,00.
*sid@sosialurin.fo*

# Káta Hornið

**Frá kundatænastuni hjá FøroyaTele.**

**FT:** Góðan dag hetta er Olivant kundatænastan, hvat kunnu vit hjálpa tygum við?.
**Kundin:** Eg vil fegin hava at tit senda mær internetið
**FT:** Hvat siga tygum?
**Kundin:** Í telduhandilin søgdu tey mær at tit kundu senda mær internetið á fløgu, og tað vil eg við hesum bíleggja.
**FT:** Hvussu breið er hurð tygara?
**Kundin:** Mín úthurð?
**FT:** Ja, passar ein standar evropaplattur inn um hurðina?
**Kundin:** Hví?
**FT:** Tí at um alt internetið skal leggjast á fløgu, kemur tað at fylla uppá fleiri plattar!

# Windows 98 á íslendskum

**Vísir, týs. 21. mars 13:30**
**Windows 98 útg. 2 í íslendskari útgávu**
Sambært internet útgávuni av Visir týsdagin, byrjaði íslendska fyritøkan Tölvudreifing hf í gjár 22. mars smásøluna av Windows 98 útg. 2.
Hetta er stórhending í íslendskari teldusøgu, títt hetta er fyrsta Windows útgáva á íslendskum. Skoytast kann uppí at Mac-Os hevur verið til keyps á íslendskum í nøkur ár.
Windows 98 á íslendskum kemur í tveimum útgávum, einari útgávu sum er til nýggjar teldur og einari útgávu sum er ein uppstiging av gamlari windows xx útgávu. Fram til 15. mai kann íslendska windows 98 útgávan fáast við lagaligum treytum. Prísurin verður umleið 350 danskar krónur fyri uppstiging og 990 danskar krónur fyri fulla útgávu, sum er eitt sera gott tilboð í mun til somu ensku útgávir.

**ORÐALISTI**
Orð ið eru nýtt í K.T.Horninum í dag og frammeftir:

| | |
|---|---|
| **Evnisyvirlit** | Emneregister |
| **Fílaflutningur/fílaveiting** | Filoverførsel |
| **Heimsnet** | World Wide Web |
| **Heimstaður/heimaøki** | Domæne |
| **Ímynd** | Ikon |
| **Kervi** | Netværk |
| **Kjaksíður** | Diskussionsgrupper |
| **Leitibúnaður** | Browser |
| **Leitimaskina/Netleitari** | Søgemaskine |
| **Ravtøkni** | Elektronikkur |
| **Ritbúnaður** | Software |
| **Tíðindasíður** | Nyhedsgrupper |
| **Tólbúnaður** | Hardware |
| **Uppstiging** | Opgradering |


NOKIA
CONNECTING PEOPLE
Fartelefonir


Prísir frá kr. 1.595,-
SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - Tlf.: 317620 - Fax: 317699 - Heimasíða: www.tt.fo


# Topp-10 listin

**Mest vitjaðu føroysku heimasíðurnar**

| Hesa vikuna | Síðstu viku | Vikur á listanum | Síðunavn |
|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 3 | Magnus Sørensen |
| 2 | 3 | 4 | Faroese Chat |
| 3 | 4 | 10 | Tíðindablaðið Sosialurin |
| 4 | 6 | 10 | Dimmalætting |
| 5 | 8 | 8 | Leitel Chat |
| 6 | 5 | 3 | Føroya Javnaðarflokkur |
| 7 | 7 | 3 | Leitel Tíðindi |
| 8 | 2 | 8 | Jógvan Heinesen |
| 9 | 9 | 3 | NSÍ |
| 10 | Nýggj | 0 | Seyðasíðan hjá Rasmus |

Kelda: *www.leitel.fo*